*Leygardagur 14. august 1982*

# Tjóðveldispressan í kreppu

14. september hevur ikki verið at sæð nú í longri tíð, og kemur neyvan útaftur teir báðar fyrstu mánaðirnar. Fíggjarliga grundarlagið undir blaðnum hevur ikki verið í lagi og skal nú fáast í rættlag aftur.

Men nógv tjóðveldisfólk halda at tað er linjan hjá blaðnum sum hevur stygt lesararnar og soleiðis máað støðið undan blaðnum.

Hetta seinasta árið hevur 14. verið í stórum fíggjarligum trupulleikum. Tað, sum byrjaði sum ein mánaða summarfrí, er nú endað við, at blaðið er lagt stilt í eina tíð, fyri at fáa blaðið í gongd aftur.

Nógv eru tey, ið síggja ein samanhang millum innanhýsis stríðið í tjóðveldisflokkinum og teir fíggjarligu trupulleikarnar, blaðið nú hevur komið sær í. Stríðið stendst serliga um blaðpolitisku linjuna, sum skal haldast.

## Prorussisk infiltratión

Fjúrtandi hevur til tíðir verið so infiltreraður av prorussiskum kreftum, at nógv av vanliga tjóðveldisflokkinum hevur vent honum bakið. Seinasta heyst tók henda prorussiska infiltratiónin fullkomiliga yvirhond. Dagliga var 14. fyltur við russiskum tíðindum um Russland og onnur lond. Í oktober vóru Fjúrtandar við upp til 10-12 russiskum tíðindastubbum í einum blaði.

Øll, ið kenna nakað til russiska pressu, vita, at fyri at gerast blaðmaður, skalt tú hava verið limur í kommunistaflokkinum í so og so langa tíð, og at alt nýtt, ið ikki kann nýtast sum propaganda á ein ella annan hátt, verður tagt burtur. Vanlig tíðindi verða vend og snarað, so tey ikki eru til at kenna aftur. T.d. var ein føroyskur skúlaklassi í Russlandi, tá ísraelsmenn fríaðu gíðslarnar í Uganda. Sum flest øll minnast, oyðuløgdu teir nøkur russisk bygd stríðsflogfør aftaná sjálva atsóknina, fyri ikki at verða jagstraðir. (N.B. Russland styðjaði Idi Amin). Russiska útvarpið segði bert, at ísraelsmenn fullkomiliga ógrundað høvdu bumbað og sorað niðri í Kampala.

Er nakar sum á okkara døgum ivast í, at største parturin av russisku tíðindasendingunum eru propaganda, kann hann lættliga sannføra seg sjálvan við at lurta eftir eingilsku tíðindasendingunum hjá Radio Moskva.

Hóast hesi sjónligu brek við russisku pressuni, helt 14. fram við púra ókritiskt at víðarisenda russisku propagandina.

## Hans Jacob Debes og kjarnorkukavbáturin

Tá russiski kjarnorkukavbáturinfór upp á turt í svenska skergarðinum, var aftur galið við 14. Fyri tað fyrsta skrivaði blaðið í fleiri dagar einki um hesa hending. Tá onkur endiliga fekk tikið seg saman at skriva um hetta mál, stóð bert at ein medarbeiðari á Risø (kjarnorkukanningarstøð í Danmark) ivaðist í at prógvini, sum sviar høvdu fyri, at tað veruliga var ein kjarnorkukavbátur, vóru nóg góð. Hetta var nógv gjørt burturúr. Men sama dag fekk hesin sami medarbeiðari (sum var vinstrasosialistur) av at vita frá leiðsluni á Risø, sum segði at hann ikki hevði nakað skil fyri hesum, og tí ongan rætt hevði at úttala seg.

Ikki eitt orð um hetta í 14., eingin rættleiðing, eingin umbering.

*Hans Jacob Debes*

*— og kavbáturin*

Nakrar vikur seinni kom ein norskur (ikki kjarnorku) kavbátur inn á Havnina, væl at merkja uppkavaður og í dagslýsi. Hesa vitjan úr brøðratjóð okkara var Hans Jacob Debes so illur um, at hann samanbar hana við vitjanina hjá russiska kavbátinum sum lá og sneytaði inni í svenska skergarðinum í náttarmyrkrinum.

Samanberingin var eftir vanligari tjóðveldishugsan so heilt burturvið at hon fekk nógv at stúrsa við.

## Illstøða millum 14. og teir kristnu bólkarnar

Illstøðan millum 14. og teir ymsu kristnu bólkarnar, er heldur ikki serliga nýggj. Tey flestu munnu minnast skrivingina, ið stóðst av at Richard Wurmbrand vitjaði Føroyar, og at Karsten Hoydal, sum sat í mentanevndini í norðurlandaráðnum, læt studning til bókina Kammerat Jesus.

Hóast alla valpropagandu um hvussu heidnir tjóðveldismenn skulu vera, so hevur tjóðveldisflokkurin nógvar veljarar og stuðlar millum teir kristnu bólkarnar í landinum, m.a. hava tveir prestar verið uppstillaðir. Júst hesir bólkarnir vóru ógvuliga illa við av tí eintáttaðu pro-Kammerat Jesus skrivingini hjá 14.

Ofta hevur tað verið rættiliga langt ímillum greinarnar í 14. um átrúnaðarlig viðurskifti. Men nettupp skrivingin hjá 14. um átrúnaðarlig viðurskifti hevur fingið nógv tjóðveldisfólk at øtast. Tann antikristiliga linjan hjá 14. hevur til tíðir verið heilt gjøgnumførd, seinast 12. mai við eini grein um virkið hjá trúboðarum í heidningalondum.

Antropologurin Lars Persson hevur skrivað hesa grein í 1969, og hon stóð at lesa í einum hefti, ið kallast dansk samråd for Forenede Nationer. 13 ár seinni fær ein, ið kallar seg Sonja upp í lag at umseta greinina og seta hana í 14.

Í greinini verða trúboðarar sum heild lagdir undir at fremja valdsgerðir ímóti fólkinum, har teir arbeiða. Teir verða lagdir undir at ræna børn frá foreldrum, at misnyta børn homoseksuelt, at noyða indianarar úr sunnum til verri og ósunnari hús. Skúlarnir hjá trúboðarunum skulu heldur einki vera verdir, sitat: »har fæst lítil og eingin kunnleiki av praktiskum týdningi«.

Toppurin av kransakøkuni er ein mynd, har ein sær eina nakna indianska kvinnu, hongda upp eftir beinunum, meðan tveir menn torturera hana. Niðurstøðan ber á sama borði, sitat: »Støðan er nógv versna. Indianarar í túsundatali verða píndir og dripnir, og trúboðarar eru ofta við í leikinum«.

## Toftadrongurin og Martin Fjallstein

Ein toftadrongur, sum var so óheppin at arbeiða í sama heimsparti, har alt

**Framhald á síðu 11**





**14. SEPTEMBER**

Nr. 52 Friggjadagur 25. juni 1982 36. árg. Leysasøla kr. 4.00

**Sjónvarpsins ávirkan á skúlan**

síða 6

## SEV dylur ætlanina

*Tað sær ikki út til, at ætlanin um at útbyggja vatnorkuna rættiliga tolir dagsins ljós. Í hvussu er noktar SEV at lata almenninginum tekningarnar yvir ætlanina*

Tað skilst á øllum brøgdum, at SEV og byggifelagið Højgaard & Schultz ætla sær í gongd við útbyggingini fyrsta dagin. Tey neyðugu loyvini til byggingina eru ikki givin. Men tað hevur minni at siga. Meðan teir bíða, gera teir bara fyrireikingarnar.

Hvussu umfatandi útbyggingin verður, fær eingin at vita. Vit hava roynt at útvega okkum upplýsingar um ætlanina, men SEV hevur avgjørt at fara stillisliga fram í málinum.

Tekningarnar yvir ta upprunaligu ætlanina hava verið frammi. Síðani er ætlanin broytt, tekningarnar yvir ta nýggju ætlanina eru loyniligar.

SEV leggur ikki tekningarnar fram, tí tað verður oftast misbrúkt, sigur Klæmint Weihe, stjóri í SEV. SEV-stjórin roynir annars at umbera seg við, at SEV ongar tekningar eigur longur, tí friðingarnevndir og Fróðskaparsetrið hava fingið allar. Fróðskaparsetrinum kundi SEV ikki nokta tekningarnar, tí Fróðskaparsetrið er biðið um at gera árinskanningarnar, ið yvirfriðingarnevndin hevur kravt verða gjørdar.

*Snorri Fjallsbak frammanfyri tímatalvuni hjá skúlanum. — Næsta ár er ikki pláss fyri fleiri holum í henni*

## Eitt ár aftrat so ikki meira

*Skúlin í Hoydølum hevur verið væl stúgvaður tey seinastu árini. 500 næmingar og 50 lærarar hava malið um beinini á hvørjum øðrum í fríkorterunum, leitandi eftir hølinum. Eingir næmingar hava havt fasta stovu. Bert lærararnir hava havt fast tilhaldsstað í fríkorterunum — tann uml. 40 kvm. stóra lærarastovan er trongd, so at tað merkist.*

**Hóast tað er komið so langt at lærararnir eru farnir at kenna svíðan av plásstroti, eru ábøturnar á skúlan lítlar og ongar. Næmingarnir verða fyrst raktir, sum altíð, og fyrst teir nýggju. Tá tímatalva skal leggjast, verður fyrst hugsað um teir verandi næmingarnar. 1. g og 1. HF má so dvína.**

Snorri Fjallsbak, sum er umsitingarleiðari á Føroya Studentaskúla í Hoydølum kann fyri víst siga, at um tilgongdin til skúlan ikki steðgar næsta ár, verður ikki gjørligt at leggja eina tímaskrá fyri allan skúlan. Fleiri høli mugu útvegast, sigur hann.

Skúlin hevur 26 stovur (har ímillum fakstovur), ið eru til vanligt brúk. Harumframt eru 2 stovur til smærri tilvalslið. Komandi skúlaár verða 27 stovnsflokkar á skúlanum. Hetta fer at geva nøkur og 30 greinlið, sum hvørt skal hava eina stovu.

Hetta sigur so mikið, at tá tímaskráin verður løgd, koma altíð nøkur greinlið at ganga uttan høli. Tímatalvan hjá tí einstaka næminginum má tí kutast sundur, so at undirvísingartímar og frítímar liggja sløddir hvør um annan. Haraftrat kunnu teir nýggju næmingarnir á skúlanum rokna við at ganga til undirvísing út í 9. tíma.

At undirvísingin fer at gerast tyngri undir slíkum umstøðum, bæði hjá lærarum og næmingum, verður so upp til skúlamyndugleikarnar at avgera. Útbygging í Hoydølum er nevnd fleiri ferðir, tó uttan at nakað er hent.

Serliga er tað trot á fakhølum, sum ger seg galdandi. Skúlin hevur t.d. trot á útgerð til fysik, kemi, geografi og biologi. Tá hetta eru grundleggjandi námsgreinir, ber ikki til at hesar verða gloymdar longur.

### Upptøkan

Skúlin hevur havt sum

*Framhald á baksíðuni*

### *Blaðið í summarfrí*

14. SEPTEMBER fer nú í summarfrí. Hetta er seinasta blað áðrenn summarfrítíðina. Næsta blað kemur út aftur ólavsøkuaftan 28. juli. Saman við blaðnum, fer eisini prentsmiðjan í summarfrí, so arbeiðsplássið er stongt hesa tíðina. Vit fara at takka haldarum, lesarum og lýsarum fyri gott samstarv, tá á hevur staðið, og vóna at kunna bera tykkum eitt enn betri og meira fjølbroytt blað tá. Sum kunnugt byrjar ólavsøkutingsetan tá blaðið kemur útaftur. Tá fara vit serliga at leggja dent á at bera tíðindi úr tinginum. Vit fara framvegis at fylgja við í teimum stórmálum, ið fyrifarast í samfelagnum ídag, og royna at lýsa tey á besta hátt. Gott summar.

**Blaðstjórnin**

## Keypsamtøkan sleppur undan skatti

Landsstýrið fekk ikki viðhald í sakarmálinum ímóti Føroya Keypsamtøku. Mikudagin fall dómur í Eystara landsrætti, og dómurin gevur Keypsamtøkuni viðhald. Keypsamtøkan er ikki skattskyldug eftir okkara skattalóg. Pantikravið, sum varð lagt ímóti Keypsamtøkuni, fellur eisini burtur. Kravið var slakar 800.000 krónur.

Blómubúðin
»FLORA«
Hoydalsvegur 8
Tórshavn
Telefon 16044
*Sendir um alt landið: dekoratiónir - bukettir - plantir og nú eisini kransar.*

KJARTAN DALSGAARD
UMBOÐS
TLF 15222

Restorffs
Bryggjarí
Svarar eisini aftaná vanliga arbeiðstíð
tlf. 14728

Føroya Bjór
Tórshavn tlf 13434
Leirvík tlf 43038
Klaksvík tlf 55454
Tvøroyri tlf 71025
SÍÐAN 1888

*Seinasti fjúrtandin — hvussu leingi?*